# **Tá Norðlýsið stevnir** á fjørðin, er summar í hondum

**Tað eru í ár 20 ár síðani Norðlýsið byrjaði sítt virksemi at sigla við ferðafólki kring landið. Føroyingar brúka Norðlýsið til m.a. firmaútferð, føðingardagar, hátíðardagar og skúlaútferðir. Tá komið er longur út á summari eru fleiri fremmand ferðafólk millum gestirnar.**

**HANDIL**
**Dagfinn Olsen**
dagfinn@sosialurin.fo

Skonnartina Norðlýsið kenna allir føroyingar í dag, og ikki eru tað heldur so fá útlendsk ferðfólk, ið hava fingið ein ógloymandi túr við Norðlýsinum.

Birgir Enni er skipari, kokkur og ferðaleiðari, og hann tekur soleiðis til:

- Fyri skipara, manning eins og ferðafólk er hvør ferð við Norðlýsinum ein nýggj ferð við nýggjum upplivingum og avbjóðingum. Á sjónum er ýðjandi lív kring allar oyggjarnar. Talan er um tann partin av Føroyum, sum vit ikki síggja á landi. Lívið á landi kann heldur ikki samanberast við lívið í sjónum, - og má tí upplivast. Norðlýsið vitjar nakrar av okkara vakrastu og mest áhugaverdu perlum kring landið.

## Norðlýsið og summarið

Norðlýsið flaggskipið hjá ferðavinnuni. Tá Norðlýsið stevnir út á fjørðin, so er summari í hondum og fremmand ferðafólk komin til landið.

Í ár eru 20 ár síðan Norðlýsið byrjaði sítt virksemi at sigla við ferðafólki kring landið.

Norðlýsið væntar sær nógv av at hava flutt til Vágsbotn at liggja. Her hoyrir skipið líkasum heima og fólk eru sera glað um tað.

- Um hesa tíðina eru tað serliga føroyingar sum brúka Norðlýsið til m.a. firmaútferð, føðingardagar, hátíðardagar, skúlaútferðir við meira. Tá vit koma longur út á summari eru fleiri fremmand ferðafólk millum okkara gestir. Fleiri av ferðamannaskipunum hava leiga skipið meðan tey vitja í Føroyum, siga tey á P/F Útferð, ið stendur fyri virkseminum hjá Norðlýsinum..

Tað sum er serliga væl umtókt eru sightseeing túrarnir undir fuglabjørgum, í hellum og gjáum undir Hestoynni og Nólsoynni. Og ikki at gloyma heimskenda fiskasúpanin hjá Birgiri Enni. Norðlýsið ger eisini nógvar túrar út til Nólsoyar, har tætt er samstarv við kunningarstovuna, sum kann skipa fyri vitjanum hjá fuglafrøðinginum, fornminnisfelagnum og til bátin hjá Ova.

Borðan er nýtt ferðamál hjá Norðlýsinum. Har ber til at síggja Tornið við heimsins enda og ganga millum húsini sum blivu bumbaði undir krígnum. Á Borðuni kann borðreiðast við grillmati. Borðan er sera vælegnað til útferðir av ymiskum slag, tað veri seg firma-, familju- ella skúlaútferð.

Til sama reiðarí er eisini skjóttgangandi báturin Brandan , sum tekur 12 ferðandi. Brandan er sera vælegnaður at koma skjótt runt í Føroyum og verður eisini brúktur sum sjógangandi hýruvognur.






TRYGD
hugsar um teg.






Fnískir summarjakkar til tey minstu frá PETIBOM

Í Miðlon · Hoyvíksvegur 67
100 Tórshavn · Tel 321755

SNÁK